## DAGSINS MEINING

# Framstig á samferðsluøkinum

Stórar hendingar eru farnar fram í hesi vikuni, sum allar hava atlit til framtíðina - og kanska eina spennandi framtíð. Hendingar, sum í ávísum førum eru huglyftandi í tí annars keðiliga summarveðrinum. Dagin eftir, at borurin varð settur í havbotnin stutt norðan fyri markið, varð skjøtul settur á Gásadalstunnilin. Og sama dag fór Teistin í sigling um Skopunarfjørð.

Talan er um stórhendingar á samferðsluøkjunum. Verður Gásadalstunnilin veruleiki á hesum sinni, er talan um eitt stórt framstig fyri eina av teimum smæstu bygdunum í Føroyum. Tað er næstan givið, at fær Gásadalur ikki vegasamband nú, ella í næstu framtíð, so verður, sagt í myndamáli, øskukalt Uppi í Dalinum, sum vágafólk siga.

Men tað er ikki nóg mikið bara at bora ein tunnil. Ein tunnil skuldi helst eisini merkt framburð, og møguleikar skuldu verið fyri framburði í Gásadali. Dalurin er stórur, upplandið er stórt, og uttan at hava kanna tað neyvari, sær dalurin út til at vera gott dyrkilendi. Har skuldi verið møguligt at dyrka av nýggjum og har skuldu verið góðir møguleikar fyri jarðarbrúksvinnu.

Sjálvandi, um vit hava brúk fyri eini landbúnaðarvinnu í Føroyum. Vit fáa so nógva mjólk undan mjólkkúnum, at kvotur eru settar á. Tí er spurningurin, um vit hava brúk fyri fleiri mjólkkúm. Harafturat ber til at keypa danska vistfrøðiliga mjólk fyri næstan sama prís sum føroyska mjólkin kostar fyri liturin, og føroyska mjólkin fær nógvan studning!!! Taka vit so kjøtið, so hava vit heldur valt at innflyta bíligt útslendskt kjøt í staðin fyri, at vit sjálvi høvdu okkara egnu drápsmenn. Og tó, nakrir bøndur eru so frægir, at teir hava tikið stríðið upp, og hava valt at hava drápsneyt.

Aðrir møguleikar skuldi eisini verið í Gásadali. Áin er stór, og er vatnið nóg mikið, skuldi verið møguligt fyri at havt eina smoltstøð í Dalinum. Her eru tvær vinnu nevndar, sum, um rætt verður atborið, skuldu kunna givið bygdini møguleikar at reist seg av nýggjum.

Ein tunnil er kostnaðarmikil, men politkkurin hevur verið, at allar bygdir skuldu hava vegasamband, og tí er tað rætt, at Gásadalur fær tunnil, hóast onkur vil siga, landsbúskaparliga loysir tað seg ikki. Men verða møguleikarnir troyttir, skuldi tað eisini merkt búskaparlig framstig, nú ella í framtíðini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðv. ferðasambandi Klaksvíkar

**Steinbjørn O. Jacobsen**
*borgarstjóri*



Býráðið hevur seinastu tíðina fingið ófrættakendar upplýsingar viðvíkjandi umstøðunum á farleiðini til og frá Klaksvíkini og Norðoyggjum.

Leiðsla býráðsins hevur tí roynt at ávirka avvarðandi myndugleika til at fremja munagóðar ábøtur, og ætla vit ikki at gevast, fyrr enn málið er rokkið.

Tað er nú vorðið dagligur kostur, at ein mongd av bilum og fólki mugu bíða í tímavís eftir plássi umborð á verandi ferju, Dúgvuni, áðrenn tann hart kroysta manningin umborð endiliga fær møguleikan at flyta sínar kundar um fjørðin.

Hesum kann Klaksvíkar Býráð als ikki liva við longur, og verður við hesum heitt á landsstýrismannin um beinanvegin at gera nakað ítøkiligt fyri at bøta um hesa fyri bý okkara sera skaðiligu støðu.

Tað nøktar snøgt sagt ikki longur tørvin, at Klaksvíkin bert fær tikið ímóti 30-40 akførum pr. túr við so avmarkaðum túratali. Mint verður á, at vit her tosa um næststørsta býin í landi okkara, sum hóast ringu umstøðurnar framvegis er ein av leiðandi miðstøðunum innan høvuðsvinnu okkara.

Umframt skaðan á persónliga trivnaðin og tað frítíðarlív, sum er í býnum, er verandi farleið um Leirvíksfjørð ein álvarsom hóttan ímóti lívsæðr býarinnar, vinnulívinum, sum dagliga kennir sviðan av at liggja í einum ferðsluliga afturútsigldum útjaðara.

Eingin ivi er um, at verandi umstøður hava kostað Klaksvíkini nógv á vinnuliga økinum, og verður einki gjørt í bræði við hendan stóra trupulleika, fara avleiðingarnar helst at verða óbótaligar.

Tað er tí býráðsins inniliga vón, at landsstýrismaðurin beinanvegin, saman við Strandfaraskipum Landsins, setir tiltøk í verk, sum gera tað møguligt hjá bæði borgarum og vinnulívi at koma rímiliga ótarnaði um fjørðin.

Í hesum sambandi ynskir býráðsleiðslan fund við landsstýrismannin – helst saman við leiðsluni í Strandfaraskipum Landsins – har útvegir úr hesi ringu støðu kunnu verða funnir, eisini við atliti til Kalsoynna.

Umframt akuttu støðuna er atvoldin til hetta skriv eisini eitt annað mál, sum fyri framtíð Klaksvíkar og landsins er sera týðandi og avgerandi.

**Fasta ferðasambandið um Leirvíksfjørð.**

Í sambandi við raðfestingar á langtíðar fíggjarlógini hoyrast leiðandi politikarar í fjølmiðlunum um dagarnar tosa um at útseta ætlaða undirsjóvartunnilin um Leirvíksfjørð.

Vónandi siglir verkætlanin um Leirvíksfjørð tó ikki vandasjógv – men um so er, er neyðugt at rópa varskó!

Fyri Klaksvíkina og landið alt er fast ferðasamband tann einasta fult nøktandi loysnin, um hesin týðandi partur av Føroyum skal fáa rímilig livilíkindi.

Einar Norðoyggjar, fast knýttar at meginøkinum, fara ósvitaliga vist at geva føroysku framleiðsluni og útflutninginum eitt væl størri íkast, enn umstøður eru til í dag.

Hetta er ein íløga, sum umframt at verða lutvíst sjálvberandi, lønar seg sera væl samfelagsliga – tað er tí púra burturvið at útseta hana, nú høvið aftaná Vestmannasund er so sjálvsagt.

Kemur undirsjóvartunnilin um Leirvíksfjørð fyrst í drag, kemur hann seinni í lag – helst ganga áratíggju, hetta gevur søgan so mong dømi um.

Sum kunnugt, stuðlaði Klaksvíkar Býráð vágatunnlinum – eisini tá onnur talaðu ímóti – og gongur Klaksvíkar Býráð tú út frá stuðuli, nú tað brennur á her hjá okkum.

Sambært tí politiskt góðkenda kommunuálitinum og tí arbeiði, sum løgmaður síðani hevur sett í gongd, skal málsøkið eldrarøkt í næstum leggjast út til kommunanna fullu ábyrgd og fígging, samstundis sum skattabýtið millum land og kommunur verður broytt tilsvarandi.

Tað er tí burturvið, at landspolitikarar brúka raðfestingar av eldraøkinum á langtíðar fíggjarætlan landsins sum grundgeving fyri útseting av fasta sambandinum um Leirvíksfjørð, tá landið samstundis arbeiðir við at leggja eldraøkið út til kommunurnar.

Her er vert at minna á, at Klaksvíkar Býráð eisini her gongur undan við tiltøkum á eldraøkinum, hóast hetta málsøkið, og tilhoyrandi skattainntøkan, enn liggur hjá landinum.

Heitt verður tí á landins myndugleikar um at raðfesta hesa stóru men sera gevandi íløgu so frammarlaga, at hon kann fara í gongd sum framhald av íløguni um Vestmannasund.

Avrit av hesum skrivi er sent løgmanni.

# Rætting frá Verkfrøðingafelagnum

**Føroya Verkfrøðingafelag**

Vísandi til Sosialin mikudagin 11.juni skal verkfrøðingafelagið boða frá, at tað tíverri av misgávum hevur sent tvey ávegis skriv til blaðið, sum eru endurgivin á síðu 12. Felagið vil við hesum biðja um umbering fyri mistakið.

Skrivið til Løgtingsins umboðsmann er ikki endaligt viðgjørt í nevndini og er av somu orsøk ikki sent umboðsmanninum. Hjálagt er tað endaligt viðgjørda tíðindaskrivið. Í viðgerðini av skrivinum kom nevndin til ta niðurstøðu, at málið um Henning Jacobsen ikki skuldi tvinnast upp í núverandi trupulleikar. Við hesum heitir felagið tí vinarliga á Sosialin um at seta tað endaligt viðgjørda skrivið í blaðið saman við eini umbering frá felagnum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Viðmerkingar hjá Kjartan Hoydal – Hvat kunnu tær brúkast til?

**Jógvan Mørkøre**
*samfelagsfrøðingur*



**Syndarliga lítið, fyri ikki at siga einki, skulu vit meta eftir tí, ið borðreitt hevur verið við frá hansara síðu um spurnarkanningar í sambandi við spurningin um fullveldi og skiftistíðina. Tey, ið takast við hesar kanningar, kunnu ið hvussu er ikki brúka tær til nakað.**

Tað byrjaði við hesum orðunum frá Hesuferð: “Illa undirbygdar meiningakanningar gjørdu síðani, at hetta áramálið — fimtan ár — fekk alt ov stóran politiskan týdning.” Carl Jóhan Jensen hevði 1. februar grein í bløðum, ”Stutt skiftistíð má vera eitt krav”, har hann vegna Hesuferð umrøddi spurningin, hvussu long skiftisella niðurlagingartíðin skuldi vera. Líknandi grein var at finna á heimasíðuni hjá Hesuferð, men í hesum førinum ikki við Carl Jóhan Jensen sum undirskrivara fyri felagsskapin.

Carl Jóhan Jensen fekk 2. februar eitt retoriskt aftursvar: “Tá so Carl Jóhan Jensen síðani fær tað til, at ”illa undirbygdar meiningakanningar gjørdu síðani, at hetta áramálið – fimtan ár – fekk alt ov stóran politiskan týdning”, so má tað eisini merkja, at væl undirbygdar meiningakanningar høvdu gjørt, at áramálið fimtan ár hevði ikki fingið sama politiska týdningin — og at mangt kundi verið øðrvísi í fullveldisgongdini! Spurningurin, Carl Jóhan Jensen nú skyldar okkum at svara, gevur seg sjálvt: Hvussu skuldi henda væl undirbygda meiningakanningin verið gjørd? Sum vera man so hevur tað alstóran týdning, at vit fáa hesa leiðbeining frá Carl Jóhan Jensen, so Fynd ikki aftur eina aðru ferð í berum ósketni kemur til at skumpa søgunnar hjól skeivan veg.”

9. februar kemur Kjartan Hoydal fram á vøllin fyri Hesuferð, og einki hoyrist aftur til Carl Jóhan Jensen. Kjartan smoykir sær undan at svara, hvussu tann væl undirbygda meiningakanningin skuldi verið gjørd, sum ikki hevði snarað politisku gongdini av leið, og setur í staðin fram eina røð av spurningum um meiningakanningar sum heild. Men lovar annars at svara, tá hann hevur fingið svar upp á sínar spurningar: “Tá hesir spurningar eru svaraðir, eru vit betur før fyri at svara, um grundarlag var fyri at siga, at tann parturin av spurnarkanningunum, sum hevur fingist við skiftistíðina, er illa undirbygdur.” - “Fyribils kunnu vit kanska siga, at orsøkin til, at Hesuferð nýtti orðini »illa undirbygdar«, var, at mátin spurt var um ymiskar skiftistíðir eftir okkara tykki, gjørdi tað rættiliga ringt at svara. Hvat liggur til grund fyri metingtini av skiftistíðini? Hevði ein annar spurnarháttur givið heilt onnur úrslit?”

Spurningarnir, Kjartan Hoydal vegna Hesuferð setur fram, verða svaraðir 26. februar í drúgvari frágreiðing um Fynd og meiningakanningar. Samstundis sum hann og Hesuferð verða mint á, at tey skylda okkum eitt svar:

“Kritikkurin, sum er komin frá Hesuferð, kann samanfatast í tveimum: 1. Veljarakanningar hava gjørt, at áramálið 15 ár fekk ov stóran týdning í orðaskiftinum um ta fyrru fullveldisætlanina hjá landsstýrinum. 2. »Fjølmiðlarnir, sum bíleggja veljarakanningar, hava ikki áhuga í regluliga at fylgja, hvussu veljararnar hugsa um ávísar spurningar. Skiftandi spurningar gera tað rættiliga ringt at fylgja eini gongd, og kanningarnar vera so at siga altíð gjørdar, tá danska stjórnin hevur spælt út.« (Orðarætt frá heimasíðuni hjá Hesuferð.) - Í hvørgum førinum hevur Hesuferð ella umboð tess greitt nærri frá, hvørjum hetta verður bygt á.”

Síðani valdaði tøgn - og framvegis er einki svar komið frá Kjartani Hoydal, Carl Jóhan Jensen ella Hesuferð. Deyðatøgn hevur valdað í næstan hálvt ár. Til nú, Kjartan Hoydal í grein í Fregnum, “Fynd kanningar - Hvat kunnu tær brúkast til?” tekur svarið hjá mær undir lupp í eini meting av Fynd í síni heild. Giti, at hetta samstundis skal eitast at vera svar upp á spurningin, sum hann royndi at smoykja sær undan í februar.

Nú hevur Kjartan Hoydal longu einaferð sloppið sær undan at undirbyggja kritikkin hjá sær í februar við at leita sær spurningar í lærubókini um veljarakanningar. Og hevur fingið eitt umfatandi svar upp á hesar spurningar í teirri vón, at hann so eisini kom aftur til tað, sum alt snúði seg um. Soleiðis sum lovað.

Tað vísir seg ikki at bera til. Eftir at hava lisið víðari í lærubókini, hann bygdi sínar fyrru spurningar á, ger Kjartan Hoydal seg í staðin til dómara yvir veljarakanningarnar hjá Fynd. Meiningin er so ivaleyst, at vit skulu aftur til at svara hesum.

Fyri fyrst kunnu vit siga, at

- Fynd stendur bæði fyri avmarkaðum telefonkanningum (forsagnakanningum) og meira umfatandi spurnarblaðskanningum. Háttalagið er í allar mátar ymiskt og ambitiónin somuleiðis. Hesum varð greitt frá í svarinum til Kjartan Hoydal upp á spurningarnar í februar. Stóru spurnarblaðskanningarnar hava vanliga verið gjørdar aftan á løgtingsval; forsagnakanningarnar (telefonkanningarnar) eftir umbøn frá fjølmiðlunum upp undir val. So at meta allar Fynd-kanningar undir einum, soleiðis sum Kjartan Hoydal ger, er skeivt og misvísandi.
- Kjartan Hoydal er beinleiðis naivur, tá hann roynir at billa sær sjálvum og øðrum inn, at tað er ein aðalmunur á “professionellum spyrjarum” hjá meiningakanningarstovnum og næmingum á miðnámsskúlum og Fróðskaparsetrinum.
- Tá ið Kjartan Hoydal fer inn á óvissuútrokningarnar, ger hann ógrundaða niðurstøða.
- Brotið um viging og tær leiðbeiningar, Kjartan Hoydal borðreiðir við, eru óbrúkilig.
- Brotið um munin millum treytaðar spurningar og ótreytaðar spurningar er banalt í sínum inngangi, og óviðkomandi, tá dømi um longd á skiftistíð verður tikið fram, tí tað hevur einki við nakra ítøkiliga kanning at gera.
- Eingin grund er at brúka tøl úr Bretlandi ella at bíða við einum endaligum dómi “yvir,um nakað skil er á kanningunum hjá FYND”, sum Kjartan Hoydal tekur til, til komandi løgtingsval. Fynd hevur staðið fyri forsagnakanningum upp undir løgtingsval fyrr, og metingar hava verið gjørdar, hvussu væl er rakt. Endaligan dóm kundi Kjartan Hoydal felt longu nú, hevði Kjartan Hoydal viðgjørt forsagnarkanningarnar í fakligum álvara.

Men áðrenn farið verður víðari við hesum í serligari grein, eigur Kjartan Hoydal at svara tí spurninginum, sum setti gongd á hetta orðaskifti: **Hvussu skuldi ein meiningakanning verið gjørd, so at áramálið fimtan ár ikki hevði fingið sama politiska týdningin?**

Í fyribils svarinum, har Kjartan Hoydal lovar okkum eitt nágreiniligari svar, verður m.a. sagt. **“Fyribils kunnu vit kanska siga, at orsøkin til, at Hesuferð nýtti orðini »illa undirbygdar«, var, at mátin spurt var um ymiskar skiftistíðir eftir okkara tykki, gjørdi tað rættiliga ringt at svara.”** - Sambært hesum má svarið innihalda ein ítøkiligan kritikk av spurningunum um skiftistíðir.

Harumframt fara vit enn einaferð at biðja um at fáa greitt frá, hvørjum hetta verður bygt á: **“Fjølmiðlarnir, sum bíleggja veljarakanningar, hava ikki áhuga í regluliga at fylgja, hvussu veljararnar hugsa um ávísar spurningar. Skiftandi spurningar gera tað rættiliga ringt at fylgja eini gongd, og kanningarnar vera so at siga altíð gjørdar, tá danska stjórnin hevur spælt út.”** Hetta varð tikið orðarætt frá heimasíðuni hjá Hesuferð í sambandi við at Kjartan Hoydal og Hesuferð vórðu mint á at svara.

Kunnu vit ikki fáa svarað hesum spurningum, má niðurstøðan verða tann, at Kjartan Hoydal ikki sær seg føran fyri at undirbyggja hetta. Tað nógva tosið síðani verður at meta hareftir.


